## Kári um at tosa við málningar

Tað eru mangar løtur, at eg standi her við penslinum og tosi við málningarnar. Tað er næstan sum at tosa við eitt fólk, og eg kenni meg ongantíð heilt einsamallan her í atelierinum.



## Kári um at broyta seg

Listin er soleiðis í dag, at alt er loyvt. Eg havi ongantíð bundið meg heilt fastan í einum ávísum stíli ella motivi. Eg leiti altíð eftir onkrum nýggjum – kanska eitt øðrvísi landskap ella aðrar litir. Eg vil altíð royna at koma víðari og fáa nýggj ting inn í verkini hjá mær. Tað má ongantíð blíva samlibandslist.



***- Tað er sjáldan, at ein málningurin verður júst soleiðis, sum eg hevði hugsað mær frammanundan. Eg havi eitt hugskot, tá ið eg byrji, men tað hendir altíð okkurt, meðan eg arbeiði við málninginum. Við hvørt upplivi eg, at eg fari yvir til ein málning og máli okkurt, men eg veit ikki rættiliga, hvat tað er, sum eg geri. Mynd: Jens Kr. Vang***

hátt. Hetta er nakað heilt annað, enn tað eg eri vanur við, so eg eri spentur og kanska eisini eitt sindur nervøsur, segði Kári, tá ið vit vitjaðu hann á Velbastað beint fyri fráferðina.

### Steingir seg inni við inntrykkunum

Umstøðurnar hjá Kára Svensson á Velbastað eru av teimum allar-bestu. Hann hevur eitt gott og rúmligt atelier at mála í, húsini standa undir liðini av atelierinum, og úr húsunum hevur hann eitt framúr útsýnið vestureftir – til Hest og Kolturs millum annað.

- Tá ið eg havi brúk fyri at fáa nøkur inntrykk, so spáki eg mær ein túr her á Velbastað ella sitið frammanfyri vindeygað og filosoferi. Eg vil ikki síggja út frá atelierinum, tí tað hevði bara órógvað ljósið og motivini hjá mær. Eg vil heldur fara út og brúka náttúruna til íblástur, og so kann eg steingja meg inni í atelierinum við tí, sum eg havi verið úti og sansað, sigur Kári.

Hóast umstøðurnar at arbeiða undir eru av teimum allarbestu, roynast allir dagar ikki líka væl við penslinum í hendi.

- At mála er sum at fara á flot. Tú veist ongantíð, hvat tú fært heimaftur við tær. Við hvørt komi eg væl upplagdur her um morgnarnar og eri klárur at mála, men eg fái einki burturúr. Aðrar dagar gongur tað sera væl, og eg fái nógv á løriftið. Eg máli vanliga fimm málningar í senn, tí um eg renni meg fastan í tí eina málninginum, so kann eg flyta til ein annan.

- Tað er sjáldan, at ein málningurin verður júst soleiðis, sum eg hevði hugsað mær frammanundan. Eg havi eitt hugskot, tá ið eg byrji, men tað hendir altíð okkurt, meðan eg arbeiði við málninginum. Við hvørt upplivi eg, at eg fari yvir til ein málning og máli okkurt, men eg veit ikki rættiliga, hvat tað er, sum eg geri.

### Nógv verður vrakað

Ein listamaður er í støðugum bardaga við seg sjálvan fyri at fáa nakað gott burturúr, og tað er langt frá alt, sum verður málað í atelierinum á Velbastað, sum yvirlivir sum listaverk.

- Tað kemur fyri, at eg komi til arbeiðis um morgunin og finni út av, at eitt hugskot, sum eg helt verða sera gott kvøldið fyri, als ikki er so gott, og so má eg byrja umaftur. Og eg vraki eisini ofta málningar, sum eg havi málað lidnar.

- Tá ið eg skal senda málningar avstað til eina framsýning ella eitt gallarí, so sensureri eg meg sjálvan, áðrenn nakað fer avstað. Ivist eg í, um ein málningur er nóg góður, so fer hann ongan veg. Eisini tá ið verk eru send avstað, og eg skal seta tey upp í einum framsýningarhøli, so velji eg ímillum verkini, og summi koma ongantíð upp at hanga. Tað hendir seg eisini, at onkur málningur kemur upp at hanga á einum gallarí, sum eg má taka niður aftur, tí eg eri ikki heilt nøgdur við hann.

- Tað er umráðandi hjá einum listarmanni at sensuerera seg sjálvan, tí tað ger teg betur sum listarmann. Um tú ikki ert vísur í, um ein málningur er nóg góður, skal tú ikki brúka hann til nakað. Á tann hátt fært tú tað fram, sum tú ert allarbest nøgdur við, og so hækkar støðið hjá tær.

- Eg velji nógvar málningar frá, og eg eri strangur við meg sjálvan, sigur Kári Svensson.